


*– Vit hava roynt at koma so víða í heiminum sum gjørligt, og tað er spennandi at kunna uppliva nýggj støðu. Tað er altíð eitt stórt upplivilsi at fara til eitt land sum Føroyar ella Bolivia ella Kina at spæla, sigur Ian Gillan, sangari í rockbólkinum Deep Purple*

*Myndir: Jonhard Hammer*

# Gillan hevur Føroyar við í sínum viðføri

Ian Gillan stórtrívist sum sangari í tiltikna bretska rockbólkinum Deep Purple, og hann heldur, at bólkurin sjáldan hevur verið so væl fyri, sum hann er júst nú. Gillan hevur ferðast víða við Deep Purple, men fáar upplivingar kunnu samanberast við ferðina hjá honum í Føroyum í 90'unum. Hann minnist verkfall, ferð um Vestmannasund í lítlum báti, regn og og eina heilt serliga flogferð. Sosialurin hitti Ian Gillan áðrenn konsert í Danmark

**INTERVIEW**
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



Tað er Spider, sum stýrir show-inum. Hann lítur rundan um seg við einum steinrunnum og sólbrúnkaðum andliti. Sólbrillurnar fjala eyguni, og tann ljósareyða polotroyggjan skyggir í donsku sólini. Hann er líkist onkrum meira, enn tað hann er – tourmanager hjá Deep Purple.

Spider gongur undan og leiðir føroysku fjølmiðlamennirnar inn í tónleikagarðin, sum liggur aftanfyri pallin til stóra tónleikatiltakið Rock Under Broen í Middelfart.

Í einum av húsvognunum, sum eru parkeraðir til heiðurs fyri tey, sum skulu framføra á konsertini, bíðar Ian Gillan, sangari í tiltikna rockbólkinum Deep Purple.

Hann er komin til avtalaðu tíðina, er fyrireikaður til at práta og letur ikki fjølmiðlamennirnar bíða óneyðuga leingi. Við borði, har vit sessast í húsvogninum, eru fimm pør av nývaskum, myrkum hosum løgd fram. Nøkur handklæði liggja eisini og sløðast á borðinum. Jú, krøvini frá teimum stóru tónleikarunum eru ymisk, og her snýr tað seg í øllum førum um at hava hosur til at taka.

Ian Gillan veit væl, hvaðani gestirnir hjá honum eru, og hann letur ikki føroyingarnar spyrja um ferðina hjá honum í Føroyum í 1992, tá ið hann hevði tvær konsertir við sínum egna bólki. Hann fer sjálvur at tosa um Føroyar beinanvegin.

– Føroyar vóru eitt fantastiskt land at sleppa at vitja. Eg gloymi ongantíð dagin, tá ið vit komu til Føroya. Eg havi ongantíð áður ella síðani lent á einum flogvølli sum í Føroyum. Vit flugu fram við fjøllunum, sóu fuglarnar, og flogfarið sigldi frá síðu til síðu, áðrenn tað setti seg. Tað var nakað heilt serstakt, greiðir Ian Gillan frá.

## Verkfall og bátur um sundið

Ian Gillan minnist serliga væl fyrstu tímarnar av ferðini í Føroyum, tí einki var, sum tað plagdi at verða aðrastaðni í heiminum, har hann hevði verið á ferð.

– Tað var verkfall í Føroyum, og vit máttu umborð á fiskibát fyri at sleppa av oynni, har flogvøllurin er. Tað oysregnaði, og tað var bara eitt lítið stýrhús umborð á bátinum. Skiparin var inni í stýrhúsinum, og tað var ikki pláss fyri fleiri folkum inni har. Trummuspælarin hjá mær kappaðist við eina eldru kvinnu um at sleppa inn í stýrhúsið at kroka, sigur Ian Gillan.

– Vit høvdu alla okkara útgerð umborð á bátinum, og vit royndu sum frægast at halda hana turra yvirum. Tað var ein fantasktisk kvøld, og vit høvdu tað sera gott í Føroyum.

Fyri Ian Gillan hevur tað altíð verið nakað serligt at vitja lond, har hann ikki hevur verið áður.

– Tá ið vit vóru yngri, plagdu vit at spæla á føstum støðum týskvøld, hóskvøld og leygarkvøld, men vansin við hesum er, at fólkini hoyra sama bólk allatíðina, og tað verða tey troytt av. Tað er eisini troyttandi hjá einum bólki bara at spæla á somu støðum, og tí er tað umráðandi at koma víðari og fara at ferðast við tónleikinum.

– Vit hava roynt at koma so víða í heiminum sum gjørligt, og tað er spennandi at kunna uppliva nýggj støðu. Tað er altíð eitt stórt upplivilsi at fara til eitt land sum Føroyar ella Bolivia ella Kina at spæla, sigur Ian Gillan.

## Hvílir seg áðrenn framførslur

Tað er hálvur annar tími, til framførslan hjá Deep Purple á Rock Under Broen skal vera, og nú skulu seinastu fyrireikingarnar til konsertina gerast hjá Ian Gillan og hinum í bólkinum.

– Eg blívi altíð spentur, áðrenn eg skal á pallin, og vanliga má eg taka tað róligt áðrenn eina framførslu. Eg plagi at fara ígjøgnum eina rutinu áðrenn eina konsert, og eg eri ikki sum nógvir aðrir tónleikarar, at teir vilja øsa seg upp og fáa adrenalinið at pumpa, áðrenn teir fara á pallin. Eg royni at slappa av, eg mediteri eitt sindur, og so eksploderi eg á pallinum, sigur Ian Gillan.

– Hetta er ikki nakað, sum er komið við árunum. Eg fann tíðliga út av, at eg skuldi ikki gera ov nógv av áðrenn eina konsert, tí so kom eg at mangla orku undir framførsluni. So eg havi altíð slappa av, áðrenn eg skal á pallin, so at eg veruliga kann geva meg fult undir konsertini, sigur hann.

Fyrstu ferð, Ian Gillan stóð á odda fyri bólkin Deep Purple, var 10. juli 1969, tá ið teir spældu á Speakeasy í London.

– Eg minnist sera væl hesa fyrstu konsertina. Tað vóru eini 40 fólk til konsertina, og meginparturin av teimum vóru hjálparfólk hjá okkum og full fólk. Eg hevði longu tá eina avgjørda vissu um, at hetta var ein heilt serligur bólkur, so tað var nakað serligt fyri meg at fara á pallin fyrstu ferð.

– Eg hevði spælt í fleiri øðrum bólkum frammanundan, men Deep Purple var nakað serligt. Eg visti tað beinanvegin, tí tónleikarar vóru so framúr góðir.